**GERIÐ KVETTI**
Ein óbrúktur Cube 30 forsterkari við øllum møguligum effektum. Ein FS-5L Switch-pedal fylgir við. Sera gott ljóð, fyri einans 2.700 kr. Nýprísur 2.500 kr.
*Tlf. 449251*

**TIL SØLU**
2 dali hátalarar + forsterkarar til sølu fyri 1.500 kr.
*Tlf. 271836*

**DIGITALUR GUITARFORSTERKARI**
Av slagnum Yamaha til sølu. Nýprísur 12.000 kr. Gevi eitt boð.
*Tlf. 508270*

**YAMAHA TVØRFLOYTA**
til sølu.
*Tlf. 224576, e. kl. 17.00*

**GER KVETTI**
NAD stereo power amp 218 thx, NAD stereo pre amp, Kenwood fløgu- og minidisk spælari og 2 Dali Evidence 870 hátalarar, 500 W stk. Lítið brúkt, til sølu fyri 20.000 kr. Nýprísur uml. 40.000 kr. Ring og hoyr nærri á
*Tlf. 227188*

**TIL SØLU**
Ein bilnavigator við radio og fløguspælara og GPS antennu, merki VDO Daytona 3000 - Navigator modul 4000. Nýprísur 13.700 kr. Selist fyri 7.000 kr
*Tlf. 315741 ella 213835*

## Út- & Sjónvarp

**RADIO TIL SØLU**
Sera gott og pent radio frá 1960-árunum, hevur lampur og góða móttøku, til sølu.
*Tlf. 319613*

**RADIO YNSKIST**
Hevur nakar eitt radio 1970-árunum at selja mær. Ring
*Tlf. 519613*

**WATSON 32'' WIDESCREEN**
Sjónvarp, sum nýtt (einki brúkt), stálgrátt, til sølu fyri einans 5.400 kr.
*Tlf. 211662*

## Ymiskt

**MAT- OG KØKUTOMBULA**
verður í Gamla Skúla á Viðareiði leygardagin 23. oktober kl. 15.00. Eisini verður høvi at keypa sær ein kaffimunn. Takk fyri stuðulin.
*9. c á Ziskatrøð*

**2 FERÐASEÐLAR**
við Mærsk til sølu fyri 4.000,- kr. Avgerð sjálv/ur nær tú ferðast, einasta treyt er at tú ert aftur seinast 31. okt. 2004.
*Tlf. 257141*

**FARTELEFON TIL SØLU**
Nokia 3100, myndatól fylgir við og 1 cover, telefonin er 6 mðr. gomul og sær út sum nýggj, kr. 2.000,-
*Tlf. 269206*

**VINDEYGU TIL SØLU**
4 H-vindeygu 120x120 cm., og 4 H-vindeygu 130x120 cm., bíliga til sølu.
*Tlf. 503249*

**BARNADAGUR**
Verður í Norðskála/Oyrar skúla leygardagin 23. okt. 2004 kl. 11. Tiltøk: klovnar kl. 11, 13 og 15. Fýrahjólsbilar, andlitsmáling, T-shirt máling, livandi ludo-kapping úti, tombola byrjar kl. 13.00. Børn úr skúlanum syngja kl. 14.00. Øll eru vælkomin at lata lutir til tombola.
*Sunda Róðrafelag*

**DIGITALT SLR MYNDATÓL**
til sølu. Nikon D70 6.1 MegaPixel CCD 4,5 myndir um sek. 1 stk. AF 50 mm f/1.8D 1 stk. AF-S DX 18-70mm f/3.5-4.5G ED 1 stk. Nikon SB-600 blitz 1 stk. 512MB Compact flash kort til sølu fyri einans 11.900,-. Nýprísur 17.325,- kr. Ring á
*Tlf. 513928*

**SONY ERICSON Z200**
Spildurnýggj til sølu fyri 1800 krónur. Nýprísur, 2.234.
*Tlf: 222983*

**EIN NOKIA 3310**
1 1/2 ára gomul selist fyri 550 kr. Ringi eftir kl. 18
*Tlf. 424559 ella 509103*

**FLOGFERÐASEÐLAR**
2 Apex-ferðaseðlar á rutunum hjá Atlantsflog til sølu fyri 2.400 kr. stk.
*Tlf. 442164 ella 228894*

**VINDEYGU TIL SØLU**
Lítið brúkt topphongt vindeyga, h 110, b 90, bíliga til sølu.
*Tlf. 456522*

**YMISKT TIL SØLU**
2 Husmor-vindeygu 170x110 cm. Køliskáp v/ frystiboks undir. Lenistólur v/ innbygdum fótskamli. Song 140x200 v/ góðari madrassu, bíliga til sølu.
*Tlf. 333110*

**BOGASKJÓTING**
Bogaskjótingin byrjar aftur, mikukvøldið 20.10.04 kl.18.30. Øll ið vilja skjóta bogasjkóting, verða biðin um at møta í hølum felagsins. 10 ára aldursmark.
*Ørvur*

**FERÐASEÐIL VIÐ MÆRSK**
Opin ferðaseðil FØ/DK/FØ við Maersk til sølu fyri kr. 3.500.
*Tlf. 222985*

**KAMERA TIL NOKIA**
Til sølu fyri 600 kr.
*Tlf. 220955*

**NAKRIR ÁRGANGIR AV MYNDABLAÐNUM NÚ**
til sølu fyri 25 kr. pr. árgang. Árgangirnir eru 1974, 76, 77, 78 og 79
*Tlf. 316340*

**LOPPUMARKNAÐUR**
03X í Hoydølum skipar fyri familjudegi og loppumarknaði í skúlanum leygardagin 23. okt. Vit vilja hervið biðja fólk, sum hava onkrar lutir at lata, um at koma oman í skúlan fríggjakvøldið 22. okt. millum kl. 17 og 20, ella seta seg í samband við Iris á tlf. 226986.
*03X í Hoydølum*

**HAVAMØBLAR**
Eitt sett av havamøblum úr træi: bonkur og tveir stólar, ið kunnu klappast saman + borð.
*Tlf. 312190*

**BILLIARDBORÐ/POOL**
1,7 x 1 m, til sølu. Prísuppskot 5.000 kr.
*Tlf. 221324*

**TRENINGSBONKUR TIL SØLU**
inkl. 1,25 kg. 8X - 2,5 kg. 4X - 15 kg. 2X. Eisini eru tvær minni vektstengur + ein longri vektstong + ein treningsbonkur. Íalt kr. 1400,-
*Tlf. 507102, Pætur*

**FERÐASEÐIL**
Føroyar-Danmark t/r til sølu fyri kr 2.000. Skal nýtast innan 31. oktober.
*Ring 506030 eftir kl 15.*

**BARNATELVING**
er hvønn mikudag. Børn úr 4. skúlaflokki og yngri møta kl.16.00 til 18.00. Børn úr 5. skúlaflokki og eldri møta kl.18.00 til 20.00. Eftir barnatelvingina kunnu vaksin telva frá kl. 20.00.
*Havnar Telvingarfelag*

**SPV E100**
Fartelefon við outlook, msn messenger, internet explorer, media player (mp3), nógvum spølum og programmum. GPRS, MMS og kann avspæla allar ljóðfílar sum ringitóna. Sær út sum nýggj. 128 mb SD-kort fylgir við. Einans 1.100 kr.
*Ring 254045*

**JÓLASØLAN Í EYDNUNI**
verður 14. november. Tilmelding á
*tlf. 422234*

**NÁTTURÐA BORÐISKAR**
Tveir nátturða borðiskar av Mågestellet hjá Bing og Grøndahl, stødd 22 cm, til sølu.
*Tlf. 375290, e. kl. 19.00*

**FARTELEFON**
Samsung E700 telefon v/ lúku í snotiligum sniði. Hevur innbygda antennu, myndatól og litskerm, til sølu fyri uml. 2.800 kr.
*Tlf. 251985*

**ÁRSVEITSLAN**
hjá Tórshavnar Bátafelag verður 6. nov. í hølum Argja Róðrarfelags. Atgongumerki kunnu keypast í Kunningarstovuni. LM-Band spælir til dansin.
*Tórshavnar Bátafelag*

Barnauppsparing:

# Týdningarmest at spara upp

**Fyri at børnini skulu fáa sum best burtur úr barnauppsparingini, er avgerandi, at uppsparingin veruliga fer fram. Møguligar íløgur skulu gerast við varsemi**

FÍGGJARTÍÐINDI
*www.sparikassin.fo*

Brúkaratátturin í Cassiopeia-sendingini hjá SvF hevur sett fokus á barnauppsparing, og tað er positivt. Tvey sjónarmið um evnið komu fram í sendingini 17. oktober, men kortini restar eitt sera týðandi sjónarmið í: Hitt mest týðandi við barnauppsparingini er, at spart verður upp!

– Sjálvandi hevur avkastið týdning, men tað mest umráðandi er, at uppsparingin fer fram. Tá man so hevur uppspart eina ávísa upphædd, kann tað vera eitt gott hugskot at gera varnar íløgur í virðisbrøv, sigur Finn Danberg, fíggjarleiðari í Føroya Sparikassa.

Fyri eina lutfallsliga lítla upphædd, t.d. 50 um mánaðin í 20 ár, fær uppspararin 13.706 krónur, um rentan er tvey prosent um árið, og 14.674 krónur um rentan er trý prosent. Í báðum førum er innskotni peningurin heilar 12.000 krónur.

– Tað, sum hevur týdning er við øðrum orðum ikki, um rentan er eitt prosent hendan ella handan vegin, men at spart verður upp. Tað er snøgt sagt nakað av tí besta foreldur kunnu gera fyri at geva børnunum eina góða fíggjarliga byrjan, sigur Finn Danberg.

Sostatt ræður um hjá foreldrum og øðrum avvarðandi at fáa gongd á uppsparingina í góðari tíð. Byrjast kann við einari lítlari, fastari flyting, sum kann vaksa, tá ráðini eru til tess. Ikki fyrr enn uppsparingin er komin í eina góða legu og hevur fingið eina ávísa stødd, er klárt at tosa um íløgur.

– Transaktiónsútreiðslur og avgreiðslugjøld eta eitt petti av hvørjari íløgu, og tí er skilabest at savna sær størri upphæddir saman og síðani gera íløguna, sigur fíggjarleiðarin.

Kundar í Føroya Sparikassa hava atgongd til íløgukundaráðgevarar á øllum deildum Sparikassans, og hesir ráðgevarar veita holl ráð í øllum spurningum um íløgur.

### Peningastovnsørindi í arbeiðstíð

Ein nýggj kanning vísir, at nógv avgreiða síni peningastovnsørindi um morgunin, tá tey eru komin til arbeiðis.

Danski EDB-sentralurin SDC hevur gjørt eina kanning, sum vísir, at heimagreiðslurskipanirnar hava mest at gera stutt eftir klokkan 9 um morgunin - fáar minuttir eftir, at tey flestu eru farin til arbeiðs og hava tendrað telduna á arbeiðsplássinum.

### Hetta skriva Berlingske Tidende.

Higartil hevur vanliga fatanin annars verið, at fólk avgreiða síni sparikassaørindi umvegis heimagreiðslurnar um kvøldið ella um vikuskiftið, tá góðar stundir eru til tess.

SDC hevur gjøgnumgingið ta nágreiniligu skrásetingina av persónum, sum logga á heimagreiðslurnar, og uppgerðin vísir greitt, at privat peningastovnsørindi fyri tað mesta verða avgreidd fyrrapartar.

## VIÐMERKINGAR

# Fái skil á gjaldsskipanina

**Magna Thomassen**

Tey seinastu 25 áriani hava vit verið fleiri túrar við bili og koyrt ymsastaðni í Evropa.

Av og á rennur tú teg í onkra gjaldsskipan fyri at sleppa longur fram á leiðini.

Í fleiri førum kanst tú tó velja at koyra ein umveg sum t.d. fram við einum longum firði ella gjalda og koyra um brúnna fyri at stytta um.

Í miðevropa er heilt vanligt at gjalda fyri at koyra eftir nýggjum strekkjum á autobanum. Ynskir tú ikki tað, er møguleiki at fara eftir teimum gomlu motorvegunum uttan gjald.

Eisini á privatum vegum er gjald lagt á, har tú kanska skalt inn á eina skrivstovu at gjalda fyri at fáa fólk út at loysa bummin.

Við landamørk eru sera ymiskar skipanir. Onkrastaðni verður vegagjaldið kravt beinanvegin, aðrastaðni ræður um at vita, hvørjum bana tú sum føroyingur eigur at halda teg á, meðan onnur landamørk næstan ikki eru til á vegunum, so tú varnast onki, fyrr enn tú sært, at skeltini hava annan fremmandan tekst.

Har sum tilskilaðar ávísingar eru til bilføraran við landamørk og gjaldskipanir og hann ikki fylgir teimum, er eingin bøn. Løgreglan stendur og tekur ímóti tær einar 50 metrar longur frammi.

Nú hava vit eisini fingið vegagjald í Føroyum, við eini gjaldskipan, sum ikki megnar at fáa gjaldið í kassan, men heldur bjóðar til svik og vandakoyring uttan eftirlit, ið nyttar nakað.

Eg yvist stórliga í, at nakar annar hevði havt eina slíka skipan koyrandi í 2 ár.

Men nevndin ella stýrið tosar uppísaman og gera onki við nakað.

Hvør velur tílíkar menn í nevndir?

Høvdir á vegum, rundkoyringar o.a. skulu tálma vandan í ferðsluni kring landið, meðan bilførarar um somu tíð seta lívið hjá sær og øðrum í vága fyri ikki at gjalda bummpengar við tunnilin undir Vestmannasund.

Av hesum ávum helt eg, at mín síðsti tími var komin nú ein dagin á veg vestur ígjøgnum tunnilin.

Tá eg var komin nakað um munnan á Vágalandinum, kom ein bilur við fullari ferð ímóti mær á mínari síðu. Ein høgur betonkantur er mitt eftir vegnum, so hann slapp ikki yvir á sína høgru síðu.

Ikki sá hann út til at vilja slaka, so eg endaði heilt úti í verjugarðinum við vón um, at hann slapp ímillum, so ongin vanlukka hendi. Tankarnir koma skjótt í slíkum umstøðum. Kanska var bíðirøðin við gjaldstøðina so long, at ikki var koyrandi hjá bilum við kubba, og tí hevði hesin tikið kjansin á vinstru síðu við speedaranum í botni fyri at klára tað, áðrenn nakar kom ímóti? – Men nei, tá eg kom longur niðan, var ongin bíðirøð. Hvat fær so ein mann, sum sá út til bæði at kunna gajlda bummpengar og MVG til at gera slíkt óðamannaverk? Hvussu hevði verið um ein lastbilur ella bussur kom ímóti honum?

Hasin er bara ein av fleiri, sum onkisvegna royna at sleppa undan at gjalda. Tað gongur fínt. Ongin steðgar teimum, hvørki so ella so. Tað er bara at halda áfram við ørskapinum.

Hvar er nevndin ella stýrið, hvat gera teir? Sita helst við búgvið borð á tunnilsfundi við fullari løn og dupultum fundarpengum fyri tveir tunlar.

Míni ráð til tykkara ella rættari til eitt nývalt stýri eru at fáa eina gjaldskipan, har øll akfør mugu steðga fyri at gjalda undir eftirliti av vaktarfólki.

Við tí skipan gjalda vit øll, vit vera spard fyri sviki og vard fyri hættisligari koyring.

Onkur fer helst at knarra um bíðitíð. Men tað hoyrir næstan til á slíkum støðum, um vit hugsa um, hvussu tað er aðrastaðni. At bíða er ein partur av tí at fara við bili.

Góðu norðoyingar, royni og fái tykkum eina trygga gjaldsskipan í góðari tíð og latið tykkum ikki stýra av skilaloysi. – Okkara skipan man vera komin við vestfallinum. Best hevði verið, um hon fór aftur sama veg.



## HEILSANIR



**Hey góða**
Her er tú ung og pen, nú ert tú bara pen. Hjartaliga tillukku.
**Systrarnar við familju**



**Góða Kára**
Hjartaliga tillukku við 9 ára degnum í gjár. Eisini ein heilsan til tín Sigmundur.
**Heilsan babba**



**Góðu Ári, Áki og Rannveig**
Hjartaliga tillukku við føðingardøgunum, sum vóru 6. aug., 25. sept. og 12. okt.
**Kærar heilsanir Berit**



**Góða elskaða stórasystir**
Hjartaliga tillukku við 16 ára degnum og takk fyri at tú er so góð við okkum.
**Ynskja Helena og Katrin**
**PS.** Mamma, pabba og Benjamin lata eisini heilsa



**Góði elskaði langabbi**
Lukku og gleðið á tínum 90 ára føðingardegi 19. oktober.
**Ynskja Katarina og Guðrið**



*Sunnudagin fylti*
*hendan væna frú*
*Hvør skuldi tí trúð*
*Altíð løtt um*
*gólvið fer*
*væl tann høga*
*aldur ber.*
Hjartaliga tillukku Tryggvá
**Heilsan starvsfelagarnir á Oyri**



**Góða elskaða stórasystir Johanna**
Hjartaliga tillukku við 6 ára degnum tann 20. okt.
**Ynskir lítla systir**



**Góða fitta Johanna**
Hjartaliga tillukku við 6 ára degnum.
**Ynskja omma og abbi**



**Góða mamma**
Hjartaliga tillukku við degnum. Vit elska teg.
**Ynskja døturnar**


Lesið
Sosialin
-so eru tit við!

GER KVETTI
Opel Astra 1600 bíliga til sølu



Árg 97 · km. 85.000

Bilurin er í sera góðum standi og sera ekonomiskur í brúki.

Til sølu vegna flyting

Áhugaði vinarliga ringi á tel 44 30 80 ella 74 30 80, ella maila á gudny78@msn.com

Sosialurin
www.sosialurin.fo


**Heilsanir** — 30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:..............................................................................
..............................................................................
..............................................................................
..............................................................................
..............................................................................
..............................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).

Navn: ..............................................................................
Bústaður: ..............................................................................
Bygd/býur: .................................. Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«